# Skrivstovufólk/Starvsfólk

## Av tí at øktar uppgávur eru á útbreiðsludeildini, er eitt áhugavert starv hjá okkum leyst at søkja

**Høvuðsuppgávur:**
- Haldaratænastan
- Samskifti við starvsfólkið kring landið
- Postgreiðsla/Telefongreiðsla
- Vanligt skrivstovuhald

## Førleikakrøv:

**Vit vænta, at tú hevur viðkomandi royndir:**
- Skrivstovukunnleika
- Kunnleika í nýtslu av teldu
- Fyrikomandi og góð samstarvsevni
- Førleika til at arbeiða sjálvstøðugt
- Koyrikort

– og dugir at arbeiða í einum umhvørvi, har úrslit, tænasta og deadline eru lyklaorð.

Setanar- og lønartreytir verða sambært avtalu, og starvið verður at seta skjótast til ber. Tó bíða vit fegin eftir rætta viðkomandi.

## Umsókn:

**Umsókn við prógvum o.ø. skal sendast til:**
Prentmiðstøðin
Mrk.: Umsókn
Postboks 3314
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 28. apríl 2008.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til
Hallstein Sigurðsson, samskipara, á telefon 564600

P/F Prentmiðstøðin varð stovnað á sumri 2000, tá Dimmalætting og Sosialurin løgdu blaðprentsmiðjur sínar saman. Endamál felagsins er at prenta bløð umframt at bera bløð út.
Í løtuni prentar felagið tey flestu bløðini, sum koma út í Føroyum, og stendur harafturat fyri flutningi og útbering av Dimmalætting og Sosialinum fimm ferðir um vikuna. Vit bera eisini reklamur til hvørt húsarhald .

**Prentmiðstøðin**

Løgmálaráðið

# Stjóri til Útlendingastovuna

Í sambandi við at avgerð er tikin um at seta á stovn Útlendingastovu, hvørs uppgáva verður at umsita mál viðvíkjandi útlendingum, ið koma til Føroyar, verður við hesum søkt eftir stjóra til stovnin.

Ætlanin er somuleiðis at Útlendingstovan seinni skal umsita persóns-, familju- og arvarætt og onnur sivilrættarlig mál, so sum navnamál.

Uppgávan hjá stjóranum er í fyrstu atløgu at skipa eina fyrisiting, ið skal ummæla mál, sum sambært galdandi lóggávu áliggur føroyskum myndugleikum at ummæla.

Harnæst skal stjórin byggja upp ein vælvirkandi nútímans stovn, ið skal sita fyri nevndu málsøkjum.

Fyri at stjórin sum skjótast skal fáa neyvt innlit í málsøkini, er ætlanin at stjórin somuleiðis skal luttaka í arbeiðinum at taka yvir málsøkini útlendingamál og marknaeftirlit, persóns-, familju- og arvarætt og luttaka í lógarsmíði á nevndu økjum.

Útlendingalóggáva, sum í stóran mun tekur atlit til altjóða sáttmálar, hevur avleiðingar á nógvum samfelagsøkjum. Tað er tí neyðugt at tann ið settur verður í starvið, hevur gott samfelagsligt innlit, og er sinnaður til framhaldandi at menna seg fakliga og persónliga.

Umsøkjarar skulu tí hava løgfrøðiliga ella aðra samfelagsvísindaliga útbúgving frá lærdum háskúla. Teir skulu hava góð samstarvsevni, duga væl føroyskt og enskt mál, og duga væl at samskifta við fólk.

Roynd frá almenna ella privata arbeiðsmarknaðinum, herundir leiðsluroyndir, er ein fyrimunur.

Starvið, ið er tíðaravmarkað í 4 ár, verður lønt ájavnt við lønarflokk 37 í sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Tænastumannafelag Landsins, tó uttan at vera tænastumannastarv. Harumframt verður veitt 15 % í eftirlønargjaldi, umframt eina ikki eftirlønargevandi áramálsviðbót uppá 20% av lønini í 37. lønarflokki.

Starvið er treytað av, at játtan fæst á fíggjarlógini.

Umsóknir til starvið skulu sendast til

Løgmálaráðið
Tinganes
Postrúm 159
110 Tórshavn

og skulu verða Løgmálaráðnum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin tann 16. mai 2008.

Tey, ið hava fyrispurningar um starvið, kunnu venda sær til Rúna Joensen, aðalstjóra á telefon 358080 ella 558070.

Postboks 159 · FO-110 Tórshavn · Tlf: + 35 80 80 · Fax: 35 80 85 · imr@imr.fo · www.imr.fo

# Vit átaka okkum alt arbeiði innan hita, vatn, ventilatión og sanitet.



**JJ RØR**
**Høgni M. Joensen**

Kristiansgøta 41 · FO-188 Hoyvík · Tel. 233040 / 233041

SKEIÐ

# Fuktur í bygningum

Í døgunum 28. – 29. mai skipar Landsverk saman við donsku fyritøkuni Byggecentrum fyri skeiðnum „Fugt i bygninger“ á Hotel Hafnia í Havn. 28. mai er skeiðið frá kl. 8.30 – 17.30, og 29. mai frá kl. 8.30 – 15.00.

Skeiðið vendir sær í høvuðsheitum til fólk í byggivinnuni og til teirra, ið varða av bygningum. Luttakaratalið er avmarkað.

**Tekning**
Boðast skal frá luttøku á sj@lv.fo í seinasta lagi 24. apríl 2008. Vinarliga upplýsið arbeiðspláss, navn og starvsheiti.

**Kostnaður**
Skeiðið kostar kr. 6.000. Íroknað gjaldið er skeiðstilfar og matur. Gisting er ikki íroknað. Luttakararnir fáa skeiðstilfarið á geyma. Peningurin skal flytast á kontu nr. 9181-128.220.6 í Eik Banka í seinasta lagi 24. apríl 2008. Vinarliga viðmerkið „Byggecentrum skeið“.

Avboð skal gevast skrivliga í seinasta lagi tvær vikur áðrenn skeiðsbyrjan. Verður avboð givið seinni, verða 50% at gjalda av kostnaðinum.

Skeiðið er stytt nakað í mun til donsku útgávuna, sum til ber at lesa um á heimasíðuni www.bygnet.dk - Kurser & Konferencer.

SENDISTOVAN

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*

*Landsverk er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum, og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.*